Fróðskaparsetur Føroya

12. februar 2009

**Frágreiðing til stýrisfund nr. 2/2009**

Dagur og klokkutíð: Hósdagin 10. februar 2009 kl. 17.00-19.00

Fundarstað: Skype-telefonifundur/Setursskrivstovan

Til staðar: Lis Mortensen, stýrisforkvinna, stýrislimirnir: Tove Bull og Juanna S. Joensen (á skype), Jan Mortensen, Winny í Pætursastovu, Jim Brown, Anni Djurhuus, Jóan Pauli Joensen, rektari og Rúna Hjelm, fyrisitingarstjóri.
Jim Brown fór av fundinum aftaná viðgerðina av máli 7, og Jan Mortensen fór av fundinum aftaná viðgerðina av máli 8.
Jóan Pauli Joensen, rektari var ikki til staðar undir viðgerðini av máli 7.

**Dagsskrá:**

1. **Góðkenning av 1/2009 stýrisfundi 15. januar 2009 og av arbeiðsfundi 16. januar 2009.**
Tikið til eftirtektar.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Góðkend.

3. **Samsýningar til stýrislimir.** (J.nr. (3) 10-01-20070018).
Stýrisforkvinnan og deildarstjórin í Mentamálaráðnum hava heitt á fyrisitingarstjóran og ein fulltrúa í MMR um at orða uppskot til skipanir av samsýningum til stýrislimir. Fyrisitingin á Fróðskaparsetrinum hevur sent Mentamálaráðnum ein fyrispurning viðvíkjandi hesum máli, men enn onki svar fingið. Setursskrivstovan skal rykkja eftir svari. Stýrisforkvinnan greiddi frá, at í uppskotinum til eykajáttan, sum er send til Mentamálaráðið, er fíggjarkarmur settur av til stýrisarbeiðið, sum fevnir um fundarpening, ferðing og neyðuga ráðgeving til stýrið.

4. **Reglugerð fyri stýrið og stýrisarbeiðnum.** (J.nr. (3) 10-00-20070009).
Avgjørt varð, at stýrislimirnir skulu fáa fatur á reglugerðum fyri stýrisarbeiði á øðrum universitetum. Winny í Pætursastovu og Jim Brown skulu samla reglugerðirnar. Á komandi stýrisfundi á Fróðskaparsetrinum 12. mars skulu tey leggja fram uppskot til, hvussu stýrið kemur víðari við málinum.

5. **Samskiftið hjá stýrinum millum stýrisfundir.** (J.nr. (3) 10-00-20070009).
Stýrið var samt um, at tey hava fingið góða kunning um fíggjarstøðuna fyri 2009 og gongdina í málinum. Her kom tó fram, at tey lesandi á summum deildum ikki eru nóg væl kunnað um fíggjarstøðuna, og at tey eru bangin fyri, at útbúgvingarnar kunnu



| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272 | J. C. Svabos gøta 14 | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |
| FO 110 Tórshavn | FO 100 Tórshavn | | | | |

verða niðurlagdar. Stýrið harmast og skilir væl støðuna hjá teimum lesandi. Tað er umráðandi, at leiðslan á Setrinum kunnar tey lesandi um fíggjarstøðuna og útbúgvingarviðurskifti skjótast til ber. Tað er umráðandi at fáa ein boðskap út til tey lesandi um, at vit gera alt, vit kunna, fyri at verja útbúgvingarnar á Setrinum. Anni Djurhuus boðaði frá, at hon saman við varalimi sínum longu hevði skrivað eitt skriv um viðurskiftini hjá teimum lesandi, sum hon fegin vildi senda øllum í stýrinum. Rúna Hjelm og Anni skulu tosa saman eftir fundin um, hvussu tað best ber til at kunna tey lesandi á deildunum.
Sum ein liður í kunningararbeiðinum hjá stýri og leiðslu til starvsfólk, samstarvsfelagar og onnur verða fundafrágreiðingarnar lagdar út á heimasíðuna. Um persónsmál ella onnur viðkvom mál verða viðgjørd á stýrisfundum, verða hesi strikaði í tí almennu frágreiðingini. Møguleikin fyri at stovna eitt afturlatið kjakforum til stýrislimirnar varð eisini viðgjørdur, og avgjørt varð at lata KT-deildina á Fróðskaparsetrinum finna eina loysn uppá samskifti hjá stýrislimunum millum fundirnar.

6. **Fíggjarstøðan 2009.** (J.nr. (3) 10-12-20070011).
Mentamálaráðið er farið undir at fyrireika umsókn um eykajáttan uppá góðar 2 mill.kr til Fróðskaparsetrið. Stýrið vísir á, at um fíggjarkarmurin hjá Fróðskaparsetrinum ikki hækkar, slepst ikki undan hópuppsagnum, og stýrið vil ikki átaka sær tilgongdina við at fremja hópuppsagnirnar. Um umsóknin verður havnað av politisku skipanini, kann einasta loysnin gerast, at stýrið fer frá. Lis Mortensen væntar skjótt at fáa eitt svar frá Mentamálaráðnum, um umsóknin fer víðari í skipanini. So skjótt hon veit meira, skal hon kunna stýrið um hetta, og tá tekur stýrið støðu út frá hesum.
Tosað var eisini um, hvørjar bindingar fyri 2009 eru í fíggjarlógini fyri 2008. Tað er púra greitt, at í tekstinum til fíggjarlógina fyri 2008 stendur, at meirjáttanin skal brúkast til nýggjar útbúgvingar á Náttúruvísindadeildini, harundir eisini umløgdu lívfrøðiútbúgvingini, til umsiting og til útbúgvinagina Master í lóg. Hesari raðfesting hevur Fróðskaparsetrið eisini fylgt, burtursæð frá Master í lóg. Orsakað av at játtanin fyri 2009 brádliga varð skerd, varð setanin av adjunkti í løgfrøði steðgað, sjálvt um ein persónur hevði fingið boðið starvið á Søgu- og samfelagsdeildini. Arbeitt verður annars við at skaffa fígging til størv frá alternativum keldum.

7. **Støðan hjá rektaranum fyri Fróðskaparsetur Føroya.** (J.nr. (3) 10-22.02-20070001).
Persónsmál. Separat frágreiðing.

8. **Skipan fyri Fróðskaparsetur Føroya.** (J.nr. (3) 10-00-20070008).
Jóan Pauli Joensen, rektari hevði sent eina kunnandi lýsing av skipan Setursins fyri Fróðskaparsetur Føroya út til fundin. Skipanin lýsir støðuna í dag og er eitt gott útgangspunkt fyri víðari strategiarbeiði á Setrinum. Samtykt varð, at stýrið og leiðslan fyri Setrið skal seta eitt strategiarbeiði í gongd fyri stovnin. Tove Bull skal skriva eitt notat, sum viðger, hvussu byrjast skal uppá hesa tilgongd, og Rúna Hjelm og hon skulu síðani skitsera eina tilgongd. Tað er umráðandi fyri stýrið, at øll starvsfólk, studentar og samstarvsfelagar verða við í hesari tilgongd.

9. **Diploma Supplement.** (J.nr. (3) 10-40-20070006).
Málið varð útsett orsakað av tekniskum trupulleikum.

10. **Ymist.**
Málið varð útsett orsakað av tekniskum trupulleikum.

RH/JPJ